

*Marner Mortensen, varastjóri í Norðoya Sparikassa, og Steintór Rasmussen fáa sær eitt prát á tíðindafundinum hjá Summar Festivalinum, sum varð hildin á nýggju deildini hjá Norðoya Sparikassa í Havn*

og tí ivast vit ikki í, at fólk veruliga kunnu syngja við, tá ið hon fer á pallin á Summar Festivalinum, sigur Steintór Rasmussen.

- Við Kim Wilde hava vit kunngjørt høvuðsnøvnini tey bæði kvøldini á Summar Festivalinum. Scorpions spælir fríggjakvøld og Kim Wilde leygarkvøld. Harafturat koma Bryan Rice úr Danmark og Jógvan Hansen úr Íslandi á Summar Festivalin at spæla.

Summar Festivalurin verður hildin í døgunum frá 3. til 5. august.


NÚ BYRJAR SØLAN
AV TRØÐUM & RUNNUM



Vakstrarhúsið Dáin
Upplatingartíðir
Mánad. - fríggjadag. 10 – 17.30
Leygardag 10 – 14.00
Sandavágur • Tlf. 33 23 64
dain@post.olivant.fo


Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

## Skúlastjóri í Sørvágs skúla

**Hevur tú hugsjónir um skúlaleiðslu og ynskir at standa á odda og virkin taka lut í menning fólkaskúlans, er hetta eitt áhugavert starv.**

Skúlastjórin seinastu 26 árini fer frá vegna aldur, og tí sóknast Mentamálaráðið eftir dugnaligum og eldhugaðum skúlastjóra til Sørvágs skúla at byrja 1. august 2007.

Sørvágs skúli er ein eitt sporaður fólkaskúli frá 1. - 10. flokk. Í skúlanum eru 142 næmingar í 1. - 10. fl., og 16 lærarar starvast í skúlanum. Skúlastjórin er dagligur leiðari skúlans og hevur undir ábyrgd skúlamyndugleikanna bæði fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans. Hann setir og loysir úr starvi lærarar og varaskúlastjóra, hann stýrir og býtir arbeiðið millum teirra, sum starvast í skúlanum, og hann tekur allar ítøkiligar avgerðir viðvíkjandi næmingunum.

**Høvuðsuppgávur skúlastjórans eru:**

- at standa á odda fyri framhaldandi menning á námsfrøðiliga og fyrisitingarliga økinum í skúlanum
- at fremja góðar arbeiðsumstøður, trivnað og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Harumframt vænta vit, at skúlastjórin:**

- hevur hug og hegni til at leiða, og at tú við tínum leiðsluhátti skapar trivnað og mennir lærarar, næmingar og skúlan sum heild
- er visjoner/ur, hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir og taka av teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman
- hevur hugsjónir um skúlamenning, og hvussu menningarætlanin verður sett í verk
- er sjónligur í leiðarastarvinum, og at tú í hesum sambandi dugir væl at lýsa tíni sjónarmið fyri øðrum.

**Setanar- og lønartreytir**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving, góð evni at leiða og kunnleika til fólkaskúlaøkið.

Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Sørvágs skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum.

Starvið er flokkað í lønarflokki 34.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag, og er lønin 31.671,67. Harumframt verður veitt ein viðbót, sum er kr. 700,00. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so at tann, sum settur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skúlastjórin hevur ávísa undirvísingarskyldu, sum verður ásett eftir galdandi reglum.

**Vit bjóða:**
Eitt spennandi og avbjóðandi starv við nógvum skiftandi uppgávum, og góðir møguleikar eru fyri fakligari menning í starvinum og fyri samstarvi við aðrar skúlaleiðarar.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 8. mai 2007 kl. 12.00.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, á tlf. 355050.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt varðir Mentamálaráðið av uppgávum viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Heimasíða Mentamálaráðsins er: www.mmr.fo


Kom sum Aladdin flúgvandi til Klaksvíkar
Tyrlan flýgur Tórshavn – Klaksvík



Mánadag 8.12
(bert juni, juli, august)
Mikudag 13.04
Fríggjadag 13.00
Sunnudag 13.52
Norðoya Kunningarstova · Varpabrúgvin 1 · 700 Klaksvík
Tlf 456939 · Fax.456586 · info@klaksvik.fo




Krosstein www.krosstein.fo
VHS Alt tilfar til VATN · HITAVERK · SANITET · VENTILATIÓN
Pf. Svend



Falkavegur 6 · FO-110 Tórshavn
Tel. 34 46 00 · Fax. 34 46 01
E-mail: krosstein@krosstein.fo